Stórkapping í fimleiki:

# Havnar Fimleikafelag vann

**Fríggjadagin var stórkapping í rútmiskum fimleiki í høllini á Hálsi fyri teir báðar yngru aldursbólkarnar. Smágenturnar hjá Havnar Fimleikafelag fáa nú møguleikan at luttaka í danska Grand Prixnum í fimleiki**



*Stórkapping var í rútmiskum fimleiki í høllini á Hálsi. Fýra feløg luttóku, og tey vóru Havnar Fimleikafelag, Ljósið, Støkk og Flog. Havnar Fimleikafelag vann bæði hjá pinkum og hjá smágentum*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

FIMLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Stórkapping, sum í veruleikanum er FM, var fyri yngru aldursbólkarnar fríggjakvøldið. Genturnar hjá Havnar Fimleikafelag vunnu bæði hjá pinkum og smágentum, og smágenturnar fáa nú møguleikan at luttaka í donsku grand prix kappingini. Tær verða tó bert við sum gestaluttakarar og hava tí ikki møguleika at vinna heiðursmerki, men tær verða dømdar eins og hini liðini. Hetta gevur teimum møguleika at samanbera seg við donsku genturnar. Danska kappingin verður tann 6. apríl.

Fýra fimleikafeløg vóru við í stórkappingini, og gleðiligt var at síggja fimleikafelagið Flog úr Fuglafirði taka lut fyri fyrstu ferð í fleiri ár. Harumframt vóru Ljósið, Havnar Fimleikafelag og Støkk eisini við.

## HF sigursharri

Havnar Fimleikafelag gjørdist tann stóri sigursharrin í hesi kappingini. Felagið vann í báðum aldursbólkunum, men sigurin var tepur, tí Ljósið var beint í hølunum.

Úrslitið hjá pinkum var, at Havnar Fimleikafelag vann við 8,35 stigum, og Ljósið var á øðrum plássi við 8,10 stigum. Støkk endaði á triðja plássi við 7,85 stigum, og Flog fekk 7,35 stig.

Hjá smágentum varð kappast í tveimum serium, eini fríar og einari við bóltum. Úrslitið í fríu seriuni var, at Havnar Fimleikafelag a vann við 8,95 stigum, Ljósið var á øðrum plássi við 8,8 stigum, Havnar Fimleikafelag b fekk 8,1 stig, Støkk 7,85 fekk stig og Flog fekk 7,0 stig.

Í seriuni við bóltum fingu Havnar Fimleikafelag a og Ljósið bæði 8,7 stig. Havnar Fimleikafelag b fekk 8,2 stig, Støkk fekk 7,7 stig og Flog fekk 6,85 stig.

Sostatt vann Havnar Fimleikafelag a kappingina samanlagt og er føroyameistari. Ljósið gjørdist nummar tvey og Havnar Fimleikafelag b nummar trý. Støkk úr Runavík endaði á fjórða plássi og Flog á fimta plássi.

Jan Christiansen setti stórkappingina, og fyrireikararnir eru væl nøgdir og gleðast um, at fýra feløg luttóku í ár.

8. mars verður stórkapping fyri gentur og kvinnur.











# Verkfrøðingur

**til Teknisku deild hjá Sørvágs Kommunu**

Søkt verður eftir starvsfólkið við tekniskari útbúgving verk/byggifrøðing til teknisku deild hjá Sørvágs kommunu. Talan er um eitt spennandi og sjálvstøðugt starv.

**Høvuðsuppgávur**
- At taka sær av projektering, uppmálingum og eftirlit av øllum viðlíkahaldi og nýíløgum í kommununi.
- At fyrireika mál, ið skulu leggjast fyri teknisku nevnd.
- At skipa fyri avgreiðslu av nevndar- og bygdarráðssamtyktum.
- At samskifta við borgarar, feløg og stovnar.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal vera verkfrøðingur, byggifrøðingur ella hava líknandi útbúgving.

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at umsøkjarin dugir væl at leggja arbeiði til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og er til reiðar at luttaka í øðrum arbeiði hjá kommununi, enn omanfyri nevnt.

**Setanarviðurskifti**
Setanartreytir sambært sáttmála við arkitekta/verkfrøðingafelagið.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi við góðum arbeiðsumstøðum.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna í Sørvági á tlf. 332004 ella 210504.

**Umsókn**
Saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu umsóknir verða Sørvágs kommunu í hendi í seinasta lagi 25. mars 2002.

**Sørvágs Kommuna**
FO-380 Sørvágur
tlf. 332004 – 210504

# Goymslufólk
## til
## Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

Á HTM er eitt fulltíðar starv sum goymslufólk leyst at seta sum skjótast.

HTM er deild Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 8 fólk á HTM.

**Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.**
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar
- tvørfakligt samstarv - innan- og uttanhýsis

**Starvið fevnir m.a. um:**
- avgreiðslu
- skipan av goymslu
- goymslustýring
- smávegis umvælingar av hjálpartólum

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:**
- viðkomandi útbúgving
- drúgvar royndir frá líknandi arbeiði
- áhuga at arbeiða við hjálpartólum
- góð samstarvsevnir
- hollan telduførleika

**Vit kunnu bjóða:**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- nýggja tøkni
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen leiðara á HTM tel. 318300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 5. mars 2002 kl. $14^{00}$.

# Tiltøk í mars 2002

**Framsýningin hjá Siri Gjesdal, Noreg, er í húsinum til og við 17. mars 2002.**

**Sunnudagur 03. kl. 16.00**
Konsert v/ GRISFO. Sigurður Flósason (ÍS) saxofon. Jim Milne (GR) piano og Edvard Nyholm Debess (FO) bass. Hetta er norðurlendsk konsertrøð, sum er stuðlar av N.A.P.A. (Nordens Institut på Grønland), Norræna Húsinum í Reykjavík, Nordisk Kulturfond og Norðurlandahúsinum í Føroyum.

**Mánadagur 04. kl. 19.30**
KLIPP, Filmsfelag Norðurlandahúsins sýnir finska filmin Badding. Markku Pölö er leikstjóri. Filmurin, sum er frá 2000 er ein tónleikafilmur.

**Mikudagur 06. kl. 19.30**
Norrøna Felagið fer at hava fyrilestur um Nordjobb og stuðulsmøguleikar

**Fríggjadagur 08. kl. 19.30**
Í sambandi við Kvinnudagin verður kvøldseta undir heitinum: »Framtíð Føroya«. Á skránni verður felagssangur, tónleikur, framløga, har kvinnuligur politikarir siga um sínar framtíðar ætlanir innan umhvørvi, búskap, ríkisrættaligari støðu, samfelagsskipan, familjumynstur, stutt sagt framtíðina hjá kvinnum, børnum og gomlum.

**Leygardagur 09. kl. 14.00**
Fotoframsýningin v/ myndum frá Antarktis hjá Klaus Kiesewetter letur upp.

**Sunnudagur 10. kl. 20.00**
ORFEUS, Tónlistarfelag Norðurlandahúsins hevur konsert í Gallerí Ribarhús **í Fuglafirði**. Ólavur Jakobsen, guitarleikari fer at spæla verk eftir m.a. Bach, Sor, Tárraga og Albeniz.

**Mikudagur 11. kl. 19.30**
ORFEUS, Tónlistarfelag Norðurlandahúsins hevur konsert. Ólavur Jakobsen, guitarleikari, fer at spæla verk eftir m.a. Bach, Sor, Tárraga og Albeniz.

**Sunnudagur 17. kl. 16.00**
Konsert v/ Føroya Symfoniorkestri

**Hósdagur 21. kl. 19.30**
Konsert, Vetrarjazzur

**Leygardagur 23. kl. 16.00**
Sjónleikur v/ finska sjónleikarahúsinum TOTEM

**Leygardagur 23. kl. 14.00**
Framsýningin »Vilde dyr i Norden« v/Annett-Mette Holm letur upp.

**Sunnudagur 25. kl. 16.00**
Føroya Landsorkestur

| | | |
|---|---|---|
| **Hósdagur** | **28.** | **Skírisdagur. Húsið er stongt** |
| **Fríggjadagur** | **29.** | **Langi Fríggjadagur. Húsið er stongt** |
| **Leygardagur** | **30.** | **Páskaaftan. Húsið er stongt** |
| **Sunnudagur** | **31.** | **1. Páskadagur. Húsið er stongt** |
| **Mánadagur** | **01.** | **2. Páskadagur. Húsið er stongt** |

***Broytingar í skránni kunnu koma fyri.***
***Høvi er at keypa te, kaffi, sodavatn, øl, breyð, køkur o.a. í kaffistovuni.***
***Húsið er opið gerandisdagar kl. 10.00 -18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00.***
***Kaffistovan er opin, tá ið húsið er opið.***

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790
e-mail:nlh@nlh.fo · http://www.nlh.fo
Tekstvarp í SvF frá síðu 650

# STÓRT TILTAK Í ARGJA SKÚLA

Leygardagin 2/3-2002 frá kl. 15.00



Mattombola
Bommtombola
**Café**
Lutaseðlasøla
Klatriveggur
**Skreiðirør**
Fiskibrunnur
**Hoppiborg**
Ponyríðing

**5.b í Argja Skúla**

**Sandoyar sýslu Javnaðarfelag**

hevur

**uppstillingarfund**

í ungmannafelagshúsinum á Sandi
***hósdagin, tann 7. mars 2002 kl. $20^{30}$.***

og

**ársaðalfund**

í ungmannafelagshúsinum í Skopun
***hósdagin, tann 14. mars 2002 kl. $20^{30}$.***

**Nevndin**

**Internet Sosialurin**
**www.sosialurin.fo**